**Løgtingslóg**

**um**

**stuðul til at byggja stórhøll í Hoyvík**

**§ 1.** Landsstýrismaðurin fær heimild til at lata 30 mió. kr. í stuðli til at byggja stórhøll í Hoyvík.
*Stk. 2.* Stuðulin verður útgoldin samsvarandi byggigongdini, í sama lutfalli sum hinir stuðulsveitararnir gjalda.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin kann í tilsøgn áseta nærri treytir fyri útgjaldi av stuðlinum.

**§ 2.** Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 31. desember 2026.

Samtykt á Løgtingi hin 16. november 2023 við 29-0-0 atkvøðum.

forkvinna

/

/

skrivari

Borið saman við samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 23. november 2023

stjóri